# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800




## Tom byrjan

Valfundurin leygarkvøldið í læraraskúlahøllini var deydligur og lítið spennandi. Verður hetta myndin, so verður talan um eitt tamt og linligt valstríð. Sum vit síggja fundin, kemur hetta av tveimum viðurskiftum, ið vóru medvirkandi til, at fundurin ongantíð lyfti seg so mikið upp frá, at hann gjørdist áhugaverdur og spennandi, ja ein veruligur valdystur.

Fyri tað fyrsta var tað sjálvur formurin ella leisturin, sum í sjálvum sær forðaði fundinum í at gerast spennandi: Fundarleiðslan hevði valt at lata allar spurningar til fólkið í salinum. Hetta gjørdi, at onnur valevni enn formenninir, ið sótu við pallborðið, sjálvandi nýttu høvið at markera seg við spurningum til teirra egnu floksfelagar ella til mótstøðumenn. Sama ger, fundarfólk og hyggjarar kendu svarini, áðrenn svararin yvirhøvur hevði tikið orðið, og hetta gjørdi fundin keðiligan og taman.

Nú fara vit sjálvsagt ikki at mæla til sensur á almennum fundi, men okkurt kundi verið broytt við teimum komandi fundunum, soleiðis at áhoyrarar og hyggjarar veruliga kunnu fáa eina hóming av tí, sum flokkarnir hava at bjóða og tí, sum skilur. Ein kundi t.d. havt eina samanseting av spyrjarum, soleiðis, at ein bólkur av atfinningarsomum journalistum og serfrøðinum høvdu fyrru helvt av fundinum. Síðan kundu fundarfólk og valevni frítt rátt fyri seinnu helvt. Hetta hevði møguliga kunnað gjørt fundirnar eitt sindur minni keðiligar og enntá meira upplýsandi.

Hin orsøkin til, at fyrsti valfundurin gjørdist eitt sindur deydligur, var, at tað var so lítil munur á sjónarmiðunum hjá teimum ymsu flokkunum. Hvat er tað, sum veruliga skilur her við byrjan av valstríðnum? Spurningurin um fiskiloyvini og hvussu fiskatilfeingið, sum verandi ogn Føroya fólks, skal umsitast, kann væl fara at gerast tann stóri stríðsspurningurin. Her er veruliga munur á áskoðanum, og hetta verður eitt heitt mál í valstríðnum og til samgongusamráðingarnar eftir valið.

Ein annar spurningur er málið um stuðul til mentan og list, har Miðflokkurin hevur eina sera víðgongda støðu. Eisini hetta mál kann fara at gerast eitt evni í valstríðnum. Men fyri nú at venda aftur til fundin, so loyva vit okkum at mæla okkara starvsfeløgum í Sortudýki til at endurskoða formin, áðrenn næsti fundur fer av bakkastokki. eitt nú við at gera brúk av egnum góðum journalistiskum kreftum. Ein samanrenning av journalistikki, serfrøði og fólksligheit er okkara besta boð.

**Sosialurin**

# Frels okkum frá valevnunum

**SÍÐULINJAN**
*Stefan í Skorini*



Eg setti meg so spentur at hyggja at veljarafundinum, sum Kringvarpið sendi beinleiðis úr Læraraskúlahøllini leygarkvøldið. Hóast bløðini hava verið á tremur við longum og einkisigandi lesarabrøvum frá vónríkum valevnum í fleiri vikur, var hetta líkasum tað veruliga startskotið til valdystin, og tí var tað við eyka entusiasmu, at man settist frammanfyri skíggjan.

Kringvarpið hevur gjørt av at broyta leistin, og tað bleiv lagt upp til, at vanligi veljarin skuldi sleppa til orðanna at seta landsins kosnu beinleiðis spurningar “live on air”, og tí var tað eyka spennandi at fylgja valsendingini hesuferð. Hetta skuldi vera líkasum í gomlum døgum, tá áhoyrararnir vóru ein aktivur partur av valfundinum, og undirhaldið tí í hæddini.

Men eg gjørdist so dyggiliga skuffaður. Ístaðin fyri at hoyra intelligentar og viðkomandi spurningar frá vanligum fólki, sum ikki hava nakað ávíst flokstilknýti, bleiv talutíðin hertikin av valevnum og yvirbevístum partíaktivistum, sum so strategiskt høvdu plaserað seg mitt í salinum.

Men, glottar vóru tó at hóma. Ein av teimum fyrstu áhugaverdu spurningunum kom frá einari kvinnu, ið var barnatannlækni. Hon var flutt heimaftur til Føroya, av tí at vit hava stóran tørv á tannlæknum her heima. Hennara konkreti trupulleiki var, at hon flutti heim við tveimum børnum, ið høvdu tørv á ávikavist serligari røkt og serligum stuðli í skúlanum, og hon fekk ikki nøkur nøktandi tilboð til síni børn. Spurningurin var stílaður til løgmann Jóannes Eidesgaard (við h, sum hann nú eitur sambært Kringvarpinum), men løgmaður slapp at svara okkurt um, at “tað skortar ikki uppá góðan vilja frá landsins síðu”.

Sum um tað kann brúkast til nakað sum helst hjá einari mammu, ið stendur við einum so álvarsomum trupulleika. Kanska politikarar so smátt eru farnir at varnast, at vælútbúgvin og arbeiðssom fólk, ið geva samfelagsbúskapinum sítt íkast, eisini fáa børn við serligum tørvi.

Øll onnur, sum settu spurningar hetta kvøldið, blivu spurd, um tey vóru nøgd við svarið, men hendan kvinnan fekk ikki høvi at geva til kennar, um svarið frá løgmanni var nøktandi. Nei, mikrofonhaldararnir úti í salinum fóru lætt og elegant víðari til næsta spurning, sum var frá einum tystum valevni, tí sjálvandi skuldi tíðin helst nýtast til valevnir heldur enn vanlig fólk, ið dittaðu sær at seta vanligar spurningar til so hábærsligar menn (ja, tað vóru bara menn í panelinum).

Og síðani vóru vit vitni til eitt cirkus av tí aðru verð. Tað, sum skuldi vera fólksins kvøld, gjørdist ístaðin ein vavgreytur av sjálvprofilerandi valevnum.

Tað er bæði irriterandi og hugstoytt, at ein slíkur veljarafundur verður yvirtikin av botnfrekum valevnum, sum bara hava eitt í huga, og tað er at sleppa á skermin í nøkur fá sekund – oh tann lukka! Eg hevði heldur viljað hoyrt spurningin frá havnarmanninum, sum gjørdi vrøvl fyri opnum skermi, enn at hoyra landsins fremstu fjølmiðlagreðingar (eru teir nevndir, eru teir kendir) sleppa at breiða seg út fyri opnari mikrofon. Tað er als ikki tað, sum tann vanligi hyggjarin er interesseraður í at síggja. Nei, gev okkum vanlig fólk, sum vit kunnu identifisera okkum við, og sum seta spurningar, sum ikki eru preproduseraðir til at passa einum ávísum valevni ella spyrjaranum sjálvum, sum hevur eina ambitión um at sleppa á okkara høga ting.

Sjálvandi kunnu orðstýrararnir vísa á, at tað eru ikki tey, sum gera av, hvør møtir upp í Læraraskúlahøllini eitt slíkt kvøld, men tá Kringvarpið frammanundan lovar, at “veljarin skal í fokus”, so ber ikki til at diska upp við einari sending á tremur við senditíðartystum valevnum. Vónandi verða vit komandi vikurnar spard fyri slíka sjálvprofilering, sum vit vóru vitni til í Læraraskúlahøllini leygarkvøldið. Muran í politikarum er nú einaferð soleiðis, at teir altíð royna at koma framat einari mikrofon ella onkrum sum líkist, og tí skuldi Kringvarpið verið fyrireikað uppá hesar hordirnar av valevnum, sum troppaðu upp og saboteraðu ársins fyrstu valsending.



**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.